STUTT SAGT

## Løgreglumenn hjálptu mafiuni

Tveir fyrrverandi løgreglumenn í New York hava fingið lívlanga fongsulsrevsing fyri at hava framt átta morð fyri mafiuna, meðan teir arbeiddu sum løgreglumenn. Undir kanningunum kom løgreglan eisini eftir, at teir høvdu fingið fasta løn frá mafiuni, samstundis sum teir fingu løn sum løgreglumenn. Samb. ákæruritinum fingu teir 4.000 dollarar í part um mánaðin frá mafiuni og 65.000 dollarar fyri eitt morð.

Sambært dóminum myrdu tann 54 ára gamli Louis Eppolito og tann 64 ára gamli Stephen Caracappa tvey fólk í tíðarskeiðinum frá 1986 til 1990, meðan teir lótu mafiuna fáa hini seks, sum síðani vórðu fyribeind. Umframt morð og medvirkan til morð vórðu teir báðir eisini dømdir fyri burturflytingar og rúsevnahandil.

Louis Eppolito og Stephen Caracappa vóru sera nógv avhildnir sum løgreglumenn, til teir fóru frá við eftirløn í nítiárunum, og teir vórðu heiðraðir fleiri ferðir. Men dómarin í rættinum í New York helt lítið um teir og avrik teirra.

– Hetta eru ivaleyst tey ringastu brotsverkini, sum hesin dómstólurin nakrantíð hevur viðgjørt, segði Jack Weinstein, dómari, áðrenn hann dømdi teir báðar lívlangt fongsul.

## Eingin friður

Hóast Avstralia hevur sent fleiri hundrað hermenn til Eystur-Timor, heldur ófriðurin har fram, skriva tíðindastovurnar.

Í gjár var sera ófriðarligt í høvuðsstaðnum Dili, sum er har norðuri í landinum, og umleið 2.000 fólk gingu mótmælisgongu uttan fyri tinghúsið, har tey kravdu, at Mari Alkatiri, forsætisráðharri, verður koyrdur frá, og at fólkið stuðlar Xanana Gusmao, forseta. Aðrastaðni settu fólk eld á, og fleiri handlar vórðu rændir, skrivar AP.

Minst 30 fólk hava latið lív í ófriðinum í Eystur-Timor, sum kyknaði í síðsta mánað, og fólk í túsundatali eru flýdd frá húsi og heimi. Nógv teirra eru nú í tjaldlegum, sum ST hevur sett upp uttan fyri Dili, og har standa avstralskir hermenn á varðhaldi.

## Ovurstór lægd á Antarktis

Eitt altjóða lið av granskarum hevur funnið eina ovurstóra lægd á Antarktis, og granskararnir eru ikki í iva um, at lægdin stavar frá einum rúmdarsteini, sum hevur rakt Jørðina eina ferð í tíðini.

Lægdin er 480 kilometrar í tvørmát, og tí halda granskararnir, at hesin rúmdarsteinurin hevur verið næstan tíggju ferðir størri enn tann, sum útruddaði dinoseurarnar fyri 250 mió. árum síðani. Eingin veit, hvat tann rúmdarsteinurin rakti Jørðina, men hildið verður, at lægdin eftir hann hevur verið einar 50 kilometrar í tvørmát.

Higartil hava granskarar hildið, at ein 180 kilometrar breið lægd í Meksiko er størsta sárið, sum Jørðin hevur fingið eftir samanstoyt við ein rúmdarstein. Tann „nýggja" lægdin á Antarktis bleiv funnin í samstarvi við amerikonsku rúmdarumsitingina NASA, tí tað vóru serútgjørdir fylgisveinar hjá NASA, sum funnu hana, skrivar Aftenposten.

## Misnøgdir skúlanæmingar

Í Kili eru skúlanæmingar og studentar sera misnøgd við, at landsins skúlaskipan er tann sama sum undir einaræðinum hjá Augusto Pinochet, og fyrradagin vóru umleið ein millión ungfólk í verkfalli. Í høvuðsstaðnum Santiago endaði tað við samanbrestum ímillum ungfólkini og løgregluna, og minst 269 fólk vórðu tikin. 24 løgreglumenn fingu skaða.

Eygleiðarar í Santiago siga, at mótmælini eru ein álvarssom avbjóðing hjá tí sosialistiska forsætisráðharranum, Michelle Bachelet, sum tók við fyri trimum mánaðum síðani. Sjónvarpsmyndir hava eisini víst, at løgreglan er farin illa við teimum ungu mótmælisfólkunum, og tað hevur fingið fólk at minnast tað, sum hendi undir einaræðinum, skrivar Reuter.

Tey ungu eru serliga misnøgd við, at stjórnin ráðfestir skúlaverkið alt ov aftarlaga við tí úrsliti, at tað er alt ov stórur munur á almennum og privatum skúlum. Stjórnin hevur lovað at játta skúlaverkinum 200 mió. doll. afturat, men tey ungu siga, at tað munar ov lítið.

UTTAN ÚR HEIMI

# Amerikonsku hermenninir í Irak eru strongdir



*Strongd og rúsevni kunnu fáa amerikanskar hermenn at skjóta óvápnað sivilfólk sum her í Haditha*

**Misnøgd, øði og strongd kunnu fáa hermenn at bróta allar reglur, sum galda í kríggi, og summir doyva kenslurnar við rúsevnum**

USA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað eru misnøgd, øði og strongd, sum fáa teir amerikonsku hermenninar í Irak at leypa framav, og tí frætta vit tíðindi um, at teir hava skotið óvápnað sivilfólk. Seinast varð ein deild hjá herinum løgd undir at hava skotið 24 fólk í býnum Haditha, og kona ein av hermonnunum í deildini er ikki í iva.

– Deildin hevur trupulleikar við rúsevnum og rúsdrekka. Eg haldi, at hermenninir vóru púra frá sær sjálvum av onkrum rúsandi, tá teir skutu fólkini í Haditha, sigur hon við Newsweek. Hon leggur afturat, at deildin hjá manni hennara er óskipað, og at moralurin er í upployson.

Ein hermaður, sum varð við deildini í Haditha, men sum varð særdur av einari bumbu, sigur, at tað er ikki óhugsandi, at felagar hansara skutu tey 24 fólkini.

– Eg veit ikki, hvat hendi, men kanska vóru teir ræddir ella óðir, og tí skutu teir tey. Tá ein verður vanur við deyða og oyðilegging, skal ikki so nógv til, at ein gerst kensluleysur og gevst at hugsa, sigur James Crosson við CNN.

Amerikanski verjuovastin, generalurin Peter Pace, hevur fleiri ferðir biðið amerikanska fólkið bíða eftir tí endaliga kanningarúrslitinum av tilburðinum í Haditha, men fleiri eygleiðarar eru longu komnir til ta niðurstøðu, at tað drúgva kríggið í Irak hevur strongt hermenninar so nógv, at fleiri teirra fara um mark.

Newsweek vísir á, at fleiri av hermonnunum í deildini, sum var í Haditha, vóru í Irak fyri aðru ferð, og at summir vóru har fyri triðju ferð í trý ár.

Summir amerikanskir fjølmiðlar samanbera tilburðin í Haditha við hópdrápið í May Lai undir Vietnamkrígnum, ið fekk amerikanska almenningin at venda sær ímóti krígnum har. Fyrrverandi generalurin Barry McCaffrey sigur tað sama:

– Fólk venda sær ímóti krígnum. Vit eru í trupulleikum í Irak, og okkara hermenn orka ikki meiri.

# Russland ávarar Ukraina ímóti NATO-limaskapi

**Eitt samt russiskt tjóðarting ávarar grannalandið ímóti ov tøttum sambandi við vesturheimin**

RUSSLAND

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað var eingin ivi í tingsalinum í Moskva, tá russiska tjóðartingið í dag atkvøddi upp eitt uppskot, sum skuldi ávara grannalandið Ukraina ímóti at fara upp í vesturlendsku verjusamgonguna NATO.

435 tinglimir atkvøddu fyri ávaringini. Eingin atkvøddi ímóti. Ein atkvøða var blonk.

– Ætlan okkara er ikki at seta ukrainsku vinum okkara krøv, men vit halda tað vera neyðugt at siga okkara hugsan um ætlanina hjá Ukraina at fara upp í NATO, segði Andrej Kokoshin við AP-tíðindastovuna. Kokoshin er formaður í teirri tingnevndini, ið viðger viðurskiftini ímillum Russland og hini gomlu sovjetlýðveldini.

Ukrainski forsetin, Viktor Justsjenko, er heitur talsmaður fyri limaskapi í NATO, og hann segði herfyri, at vónandi kann landið sleppa upp í verjusamgonguna í 2008. Eitt annað fyrrverandi sovjetlýðveldi, Georgia, hevur somu ætlanir, og Albania, Kroatia og Makedonia fyrireika seg eisini til at senda NATO eina formliga umsókn um limaskap, skrivar AP.